# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt dapurt minni

Tað eru í dag tann 30. januar 2008 liðin 75 ár síðan, at Adolf Hitler varð tilnevndur ríkiskanslari í Týsklandi, eitt dapurt minni. Við hesum byrjaði eitt tólva ára skeið við verstu ræðuleikum í søguni. Í juli árið fyri var naziflokkurin vorðin størsti flokkur við 37% av atkvøðunum, og varð hetta valið byrjanin til endan á fólkaræði í Týsklandi. Eftir hetta fóru nazistarnir undir eina skipaða herferð móti øllum, sum minti um fólkaræði. Vit kenna úrslitið: einaræði, KZ legur og forfylging av ymsum samfelagsbólkum, fyrst og fremst jødunum. Men hetta ræðuliga harðræðið gekk eisini út yvir politisk mótstøðufólk, eitt nú sosial demokratar og kommunistar eins og tað gekk út yvir serstakar bólkar sum samkynd, menningartarnað, listafólk, intellektuel, sigoynar o.o.

Tað ræðuskeið, ið her byrjaði, endaði sum kunnugt í mai 1945. Tá lógu fimti milliónir menniskju eftir á í tí heimsbardaga, sum beinleiðis gongur aftur til tann lagnutunga 30. januar, tá Hitler kom til valdið. Hvussu hetta í roynd og veru gekk til, eru søgufrøðingar ikki á einum máli um. Hvussu tað eydnaðist einum manni við 37% av atkvøðunum at tøla meginpartin part av týsku tjóðini og leiða heimin út í hitt mest ræðuliga kríggj í søgu mannaættarinnar, er framvegis nakað av eini gátu, sum søgufrøðingar framvegis granska. Vit kenna frá okkara skúlagongd tær orsøkirnar, sum vanliga verða nevndar: tapið av 1. heimsbardaga, Versaillessáttmálin, yvirvaldstrúgva ella autoritera uppalingarmentanin, dulda antisemitisman, militarisman, sum ongantíð undir Weimartjóðveldinum kom undir eftirlit, stórkapitalurin, sum longdist eftir sterka manninum, klandrið millum kommunistar og sosialdemokratar o.m.a.

Men hesar orsøkir lýsa ikki alla gátuna um nazismuna og hennara bróðurfelagskap fascimsuna. Her eru aðrar sálarfrøðiliga, mentanarliga og samfelagsligar orsøkir, sum stórur tørvur er á at fáa greinaðar og lýstar. Hvussu kundi eitt stýri, so harðrent tað enn er, megna at fáa heilt vanligar borgarar til at fara við sínum medmenniskjum á tann hátt, sum gjørt varð í KZ legunum? Er nazisman ein støðug hóttan í nútíðarsamfelagnum ella við øðrum orðum: er hon eitt úrslit av tí leisti, sum nútíðarsamfelagið er skipað eftir – ein sjúka, sum brýtur út, tá hetta samfelag kemur í altoyðandi búskaparliga kreppu? Og so tann týdningarmesti spurningurin: kann hetta alt samalt henda aftur? Kann hetta henda fyri eina og hvørja tjóð, tá umstøðurnar eru til staðar? Vit bíða framvegis eftir svarunum frá teimum lærdu. Eitt eru flest øll, leik sum lærd, tó samd um og tað er, at vit, sum eru so heppin atbúgva í demokratiskum londum, støðugt eiga at vera á varðhaldi móti nazismu, fascismu og øllum antidemokratiskum rørslum.

**Sosialurin**

## Áheitan á Javnaðarflokkin og aðrar samhaldsfastar flokkar

INGRID S.HENRIKSEN
valevni hjá Javnaðarflokkinum, hin 19. jan.



**Strikið skattalættan fyri 2008, ið serstakliga fer til høgtlønt, og nýtið í staðin peningin til skattafíggjaðan sjúkrakassa**

**Núverandi sjúkrakassaskipan vendir tunga endan niðureftir**
*Sjúkrakassagjaldið eigur ikki framhaldandi at verða goldið sum ein ávís føst krónuupphædd, ið er eins høg hjá øllum inntøkubólkum.* Tað er ikki rímiligt, at lágløntir arbeiðarar, fólka- og fyritíðarpensjónistar, arbeiðsleys, lesandi v.fl., skulu gjalda líka nógv í sjúkrakassagjaldi sum fólk, ið hava høgar inntøkur.

Løgtingslimir eiga at geva gætur, at rættiliga nógvir føroyingar hava lága løn. Yvirlit hjá Hagstovu Føroya vísir, at í 2004 vóru í alt **uml. 12.000 persónar í Føroyum lágløntir** – t.v.s. høvdu ársinntøkur, ið lógu millum 75.000 kr. og 200.000 kr.

Fólk við lágum inntøkum høvdu fingið ein tiltrongdan fíggjarligan lætta, bleiv sjúkrakassa-gjaldið fíggjað gjøgnum landsskattin. Tey høvdu sloppið frá einum sjúkrakassagjaldi, sum í miðal er uml. 3.000 kr. um árið.

**Fígging av nýggju sjúkrakassaskipanini**
Javnaðarflokkurin og aðrir samhaldsfastir flokkar eiga at tryggja sær, at skattalættin fyri 2008 verður broyttur ella strikaður við lóg – hetta frá tí degi, slíkt uppskot verður lagt fyri tingið og at spardi skattalættin eftirsíðan verður nýttur at fíggja sjúkrakassan gjøgnum progressivu landsskatta-skipanina.

ABC samgongan boðaði longu í september 2007 frá, at ein triðingur av skattalættanum fyri 2008 skal strikast og samstundis boðaði andstøðan í løgtinginum frá at ongin skattalætti átti at verða latin fyri 2008 yvirhøvur, og átti tí at verið lag á manni at tikið av skattalættan fyri 2008 til fyrimuns fyri skattafíggjaðan sjúkrakassa.

Skattalættin fyri 2008, ið enn er í gildi, gagnar í serligan mun høgtlønntum og gagnar als ikki lág- og miðalløntum. At tryggja at eisini lág- og miðallønt fáa gagn av fíggjarligum lættum/skattalættum fyri 2008 eigur skattafíggjaður sjúkrakassi at verða settur á stovn longu í 2008 – sjúkrakassi sum verður fíggjaður av spardum skattalætta fyri 2008.

Galdandi skattalætti fyri 2008, ið varð lýstur í Kunngerðarblaðnum 28. desember 2006, vendir sosialt skeivt:

Sambært løgtingstíðindi nov. 2006 (fylgiskjal 4 til lógaruppskot nr. 37) fáa lág- ogg miðallønt lítlan og ongan nettoskattalætta, meðan høgt lønt fáa sera høgan nettoskattalætta:

Láginntøka uppá 120.000 kr. fær **240 kr.**
Miðalinntøka uppá 230.000 kr. fær **765 kr.**
Háinntøka uppá 500.000 kr. fær **6.240 kr.**
Háinntøka uppá 850.000 kr. fær **7.115 kr.**
Háinntøka uppá 1.000.000 kr. fær **7.490 kr.**

At tryggja at eisini lág- og miðallønt fáa fíggjarligan lætta/skattalætta frá tí almenna í 2008 eigur skattafíggjaður sjúkrakassi at verða settur á stovn, í seinasta lagi í seinnu hálvu av 2008. Skattafíggjaður sjúkrakassi, vil gagna einum meiriluta av Føroya fólki og vil javna út stættarmunir og sosialar skeivleikar í føroyska samfelagnum. Broytingin fer í serligan mun at gagna lág- og miðalløntum arbeiðarum og øðrum lágløntum, pensjónistum, lesandi v.m., ið sjálvsagt hava mest brúk fyri fíggjarligum lættum/ skattalættum frá almennari síðu.

## Miðflokkurin og kristnu virðini í lyklastøðu

RÚNA SIVERTSEN



**Sæð frá síðulinjuni er ilt at skilja, at Miðflokkurin tykist so fúsur at fara í eitt samstarv við Tjóðveldi**

Spurningurin er, hvussu miðflokkaveljarar kenna tað, nú Miðflokkurin ætlar í samgongu við Tjóðveldi. Hetta var jú flokkurin, ið var upphavið til eina lóg, sum Miðflokkurin stríddist so hart ímóti, og eitt politiskt stríð, sum ivaleyst er orsøkin til stóru framgondina hjá flokkinum.

Skal Miðflokkurin ikki missa trúvirðið, og svíkja sínar veljarar, er minsta mark, at hann tryggjar sær, at eingi mál, sum stríða ímóti tí, sum flokkurin í valstríðnum segði seg vera einastu borgan fyri - nevniliga kristnu virðunum - verða samtykt í hesum valskeiðnum.

Í formansfrágreiðing síni á ársfundinum hjá Miðflokkinum í apríl í fjør, nam Jenis av Rana við týdningin av at hava ein kristiligan flokk burturav.

Um tað fer at gera tann mun, sum Miðflokkurin í síni agitatión vil vera við, vil nú koma at vísa seg. Miðflokkurin má tí, umframt tað, sum kemur at standa í samgonguskjalinum, eisini tryggja sær, at samgonguflokkarnir lova ikki at taka undir við møguligum uppskotum frá andstøðuni, um tey stríða ímóti grundhugsjónini hjá Miðflokkinum.

Miðflokkurin sigur seg vera einasta politiska garant fyri, at verja Føroyar ímóti undirgangi. Tað man ikki bara vera mær, at hendan framseting er fallin fyri bróstið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.